# Loysir seg nógv betur at frysta upsan

**Ábraham Løkin, stjóri á Fofish, vil ikki siga, hvussu nógv reiðaríini fáa fyri upsan, sum verður frystur umborð á russiska móðurskipinum, men hann vísir á, at prísurin er avtalaður, og hann er munandi betri, enn skipini annars fáa fyri upsan í løtuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni kemur eitt russiskt móðurskip inn á Skálafjørðin. Skipið verður lagt við oljubryggjuna hjá Runavíkar kommunu, har tað fer at taka ímóti og frysta smáa upsan, sum sølufyritøkan, Fofish í Runavík, selir fyri reiðaríini, Beta, Sjóborg og Kúrberg.

Í løtuni liggur skipið á Havnini og verður gjørt klárt at taka ímóti upsa.

Ábraham Løkin, sum er annar av monnunum aftan fyri Fofish, sigur, at eftir ætlanini skuldi russarin longu verið komið inn á Skálafjørðin, men tað hevur tikið nakað longri tíð enn ætlað at gera skipið klárt til móttøkuna.

– Vit vænta, at skipið kemur inn á Skálafjørðin í morgin, segði Ábraham, tá ið vit høvdu hann í telefonini í gjáramorgunin.

## Etin í Ruslandi

Fofish hevur fingið eitt fyribilsloyvi frá landsstýrinum, sum er galdandi í átta vikur at frysta smáan upsa – upsa 4, sum vigar upp til hálvt annað kilo – umborð á russiska skipinum. Skipið klárar at frysta 25 tons um samdøgnið, og lastir tekur eini 200-250 tons.

Ábraham sigur, at tá ið lastin er full, kemur eitt annað russiskt skip eftir fiskinum, sum verður seldur og etin í Ruslandi, sum hann tekur til.

– Sostatt kemur hesin upsin ikki aftur á evropeiska marknaðin í kapping við eitt nú føroyska upsan, leggur hann aftrat.

Stjórin í Fofish vísir á, at føroysku reiðaríini hava ongan møguleika at klára seg við tí upsaprísi, sum verið hevur í longri tíð.



*Upsin, sum verður frystur umborð á russiska móðurskipinum, verður skildur hjá P/F Beta, tí fyribilsloyvið, sum landsstýrið hevur givið í átta vikur, fevnir bert um upsa 4. Umborð á móðurskipinum verður fiskur avhøvdaður, áðrenn hann verður frystur. Høvdini verða síðan koyrd í land aftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hann vil ikki siga, hvussu nógv reiðaríini fáa fyri fiskin, sum verður frystur umborð á russiska móðurskipinum, men vísir á, at hesin prísurin er avtalaður, og hann er munandi betri, enn skipini annars fáa fyri fiskin í løtuni.

Sum skilst, er tað danska felagið, Kangamiut, sum keypir upsan frá føroysku reiðaríunum og selir hann aftur á russiska marknaðinum.

## Skildur fiskur

Fyri at lúka treytirnar, sum landsstýrið hevur sett, er neyuðugt, at upsin verður skildur, og hetta arbeiðið verður gjørt í høllini hjá Beta í Saltangará.

– Tað hevði verið lættari og bíligari fyri reiðaríini, um eini 20-30% av fiskinum kundu verið 3'arar, tí tá hevði ikki verið neyðugt at skilt fiskin í sama mun sum nú. Tá kundi tann stóri fiskurin verður skildur frá á veg niður í lastina og seldur fyri seg, meðan tann smái fiskurin fór umborð á móðurskipið til frystingar og sølu í Ruslandi.

Ábraham sigur, at treytin hjá landsstýrinum við fyribilsloyvinum er, at fiskurin verður bjóðaður út á uppboðssølu í Føroyum, áðrenn hann verður frystur og útfluttur.

– Skipini fáa so nógvan upsa – og fiskurin er so smáur, at stundir eru ikki hjá manningini at skilja allan fiskin umborð. Tí er neyðugt at gera hetta í landi, leggur hann aftrat.

Umborð á russaranum verður fiskurin avhøvdaður og frystur, og høvdini koma síðan í land aftur. Tey verða seld til Høvdavirkið í Leirvík, um teir ynskja at keypa tey.

Ábraham Løkin sigur, at upsamarknaðurin í Russlandi tykist økjast, og tí er at vóna, at hetta verður ein glotti á leiðini, nú prísurin annars hevur verið so lágur sum ongantíð áður.


TEAM85

Hjartans tøkk fyri stuðulin á fólkatingsvalinum




Anfinn Kallsberg
Annika Olsen
Bergur Bærendsen
Bjarni Djurholm
Bjarti Mohr
Hanna Jensen
Heðin Zachariasen
Hjørdis Viberg
Ingi Olsen
Jacob Vestergaard
Jákup Mikkelsen
Jógvan á Lakjuni
Jógvan við Keldu
Jørgen Niclasen
Kjartan I. Joensen
Óli Breckmann
Óli Nolsøe
Poul D. Klementsen
Poul Michelsen
Ragnar S. Olsen
Rúna Sivertsen
Tummas í Garði



XA
FÓLKAFLOKKURIN